# Boð upp á 24 milliónir fyri Nygaard

**Hálvføroyingur: Arsenal sigst vera áhugað í at fáa hálva tvørámannin úr hollendskum og í eingilskan fótbólt**

Enn eru tær nógvu milliónirnar ikki farnar á rull fyri føroyskar fótbóltsspælarar. Men tað tykist ganga tann vegin.

Í gjáramorgunin visti eingilska Daily Express at siga, at Arsenal er sinnað at keypa Marc Nygaard.

Hesin Marc Nygaard er hálvur tvørámaður. Hann valdi heldur at umboða Danmark enn Føroyar, og hann hevur fleiri ferðir verið í landsliðshópinum, síðani Morten Olsen fyri einum ári síðani gjørdist danskur landsliðsvenjari.

Sambært eingilska blaðið, sum var endurtikið í fleiri donskum fjølmiðlum í gjár, so er Arsenal venjarin, Arense Wenge, hugaður at leggja 24 milliónir krónur á borðið fyri at fáa Marc Nygaard úr hollendska Roda um Ermasund og til eingilska høvuðsstaðin.

Tilboðið sigst koma væl við, tí tað seinastu tíðina ikki hevur verið nakað serligt ímillum Roda og Marc Nygaard.

Donsku fjølmiðlarnir halda seg eisini vita, at umframt Arsenal er eisini Ipswich áhugað í at fáa Marc Nygaard til Onglands.

*jh*

# Portrið er trongt hjá FCK

**Hóast FCK í summar hevur brúkt meiri pengar at keypa spælarar fyri, enn øll hini í superliguni tilsaman, so verður tað torført at sleppa upp í part í europeisku meistarakappingini**

Tá fyrsta umfarið í donsku superliguni var á skránni í vikuskiftinum, megnaði FCK at greiða sín setning. Teir spældu leygardagin á heimavølli ímóti Viborg. Ellivu túsund áskoðarar vóru vitni til eitt ikki serliga sannførandi avrik. Viborg var á odda 1–0 í 1. hálvleiki, og teir høvdu møguleikar at skora fleiri ferðir, men teir vóru ikki nóg neyvir.

Todi Jónsson er framvegis skaddur. Men tíbetur fyri FCK, so var hin helmingurin av vandamiklastu álopsduettini í fjør, Zuma, á vøllinum. Hann skoraði tvey mál, og harvið fekk FCK, sum í 2. hálvleiki vísti meiri sannførandi avrik, trý stig.

Stórur spenningur var um, hvussu nýggi FCK málverjin, Magnus Kihlstedt, fór at standa seg. Donsku fjølmiðlarnir eru ikki serliga positivir. Hann fær undir miðal fyri avrikið, og tað er kanska ikki so undarligt, tí tað var ikki altíð so sannførandi hjá málverjanum, m. a. var um reppið, at tað kostaði eitt mál, tá hann eina ferð var langt uttanfyri brotsteigin og royndi at stúta bóltin burtur.

Í síðstu viku keypti FCK ein málverja afturat. Tað er Benny Gall, sum hesa seinastu tíðina hevur verið í Esbjerg. Frammanundan var hann í Hollandi, og áðrenn hann fór úr Danmark, var hann í Herfølge, har Jákup Mikkelsen troðkaði hann av sum næstbesti málverjin (tað var meðan Kaj Larsen framvegis var fyrsti málverji í Herfølge).



### Stórar íløgur

Í morgin skal FCK spæla í næsta innleiðandi umfarinum í Europa Cup fyri meistaralið. Mótstøðuliðið verður Torpedo Kutaisi úr Georgia. Tað kann fara at vísa seg at vera ivaleysa strevið hjá FCK samantalt at vinna á hesum liðnum.

Todi Jónsson var ikki í ferðalagnum, sum fór úr Keypmannahavn í gjár. Seinni dysturin verður annað mikukvøld í Parkini. Tað er framvegis ivasamt, um Todi tá verður tøkur.

Fyri FCK hevur tað altstóran týdning at vinna. Um tað eyndast, verður europeiska meistarakappingin framvegis í eygsjón. Og um tað í triðja innleiðandi umfarinum ikki fer at eydnast at koma í bólkaspælið í meistarakappingini, so hevur atgongdin til triðja innleiðandi umfarið pláss í UEFA kappingini við sær.

Spurningurin er so, hvussu tað fer at hilnast hjá FCK. Sambært donskum fjølmiðlum hava teir í summar keypt spælarar fyri 18,3 milliónir krónur. Øll hini feløgini hava tilsaman keypt fyri 10,2 milliónir krónur.

Umframt málverjarnar hevur FCK keypt Thomas Røll úr Silkeborg, Carsten Fredgaard úr Sunderland og Morten Bisgaard úr Udinese. Røll spældi væl sunnudagin. Carsten Fredgaard var bara á vøllinum síðstu løtuna. Hann avloysti Zuma. Heine Fernandez var í plássinum, sum venjarin sigur seg ætla Toda Jónsson. Seinna partin av 2. hálvleiki loysti Pascal Simpson Heine Fernandez av.

Morten Bisgaard spældi ikki við. Spæliloyvið hjá honum er framvegis í Italia. Tað eru teir í FCK sera harmir um.

Í FCK hava teir ikki dult, at teir hava gjørt stóru íløgurnar við tveimum málum fyri eyga. Annað er at endurvinna meistaraskapin, og hitt er at sleppa upp í part í Europa Cup fyri meistaralið. Leygardagin tóku teir fyrsta fetið í longu ferðini ímóti fyrra málinum. Í annaðkvøld fara teir at taka fyrsta fetið ímóti seinna málinum.

### Tronga portið

Um FCK megnar at vinna á georgiska meistaraliðnum, so tykist vegurin í bólkaspælið í Europa Cup fyri meistarralið at vera sera langur og trongur.

Tá lutur fríggjadagin varð kastaður um, hvussu liðini skulu hittast í triðja innleiðandi umfarinum, so fall luturin hjá FCK – um teir megna at røkka so mikið langt – á Lazio. Fyrri dysturin verður í Parkini mikudagin 8. august.

Eingin ivi kann vera um, at hetta verður ein rættuliga spennandi gloypibiti hjá FCK, Toda Jónsson og áskoðarunum – ikki minst føroyingunum, sum fara at hava møguleika at vera í Parkini hetta mikukvøldið.

Men tað er ivasamt, hvussu tað fer at hilnast hjá FCK. Lazio er eitt av stórfeløgunum í Italia. Teir hava nógvar kendar og góðar spælarar, og eingin ivi er um, at teir eisini ætla sær í bólkaspælið.

Í FCK ásanna teir, at tað verður strevið, men teir vísa samstundis á, at tað kundi ikki roknast við øðrum, enn at mótstøðuliðið fór at vera sterkt. Teir halda, at tað er betri møguleiki at vinna á Lazio, enn tað t. d. hevði verið at vunnið á Liverpool. Men nú mugu vit fyrst síggja, hvussu tað fer at hilnast ímóti Torpedo Kutaisi úr Georgia.

*jh*

# Mozyr kanska ímóti Rosenborg

**Venjarin hjá norska stórfelagnum ásannaði sunnukvøldið, at tað verður neyðugt at keypa spælarar, um tað skal eydnast enn eina ferð at koma í europeiska bólkaumfarið**

Slavia Mozyr, sum mikukvøldið sendi VB úr Europa Cup, var kanska meiri heppið, enn FCK var, tá tað fríggjadagin varð kastaður lutur um, hvussu liðini skulu hittast í triðja innleiðandi umfarinum til europeisku meistarakappingina.

Í næsta innleiðandi umfarinum, sum verður á skránni í annaðkvøld og mikukvøldið í komandi viku, skal hvítarussiska meistaraliðið spæla ímóti ASK Inter úr Bratislava.

Tað verður ivaleysa stór mótstøða hjá Slavia Mozyr. Men kanska verður tað ikki so torført, sum tað kundi havt verið, hjá tí liðnum av hesum báðum, sum megnar at spæla seg víðari í kappingini.

Vinnarin av uppgerðini skal spæla ímóti norska meistaraliðnum Rosenborg.

Tey seinastu árini hevur Rosenborg, sum fyrst skal spæla á útivølli, megnað at spælt seg í bólkaspælið, men avrikini seinastu tíðina, m. a. sunnukvøldið í Molde, hava ikki verið sannførandi.

Sambært norskar fjølmiðlar hevur Rosenborg venjarin nú ásannað, at tað verður neyðugt at styrkja um liðið. Hann vil hava ein ella tveir álopsspælarar, men hann undirstrikar, at talan verður bara um keyp, um tað eydnast at fáa fatur á spælarum, sum eru førir fyri at fara beinleiðis inn á liðið.

*jh*




TÓRSHAVNAR KOMMUNA

## Hjálparfólk

Tórshavnar kommuna søkir við hesum eftir hjálparfólki til Ellis- og Umlættingarheimið at arbeiða 30 tímar um vikuna.

**Starvið**
Fevnir um vanligt køksarbeiði.

**Setanarviðurskifti**
Starvið verður sett 1. september 2001. Løn sambært galdandi sáttmála við avvarandi yrkisfelag.

**Meir fæst at vita**
um starvið við at venda sær til Sólgerð Djurhuus, fyristøðukvinnu, tlf. 31 73 39.

**Umsóknir**
saman við upplýsingum um royndir og við møguligum viðmælum skulu verða Tórshavnar kommunu, Postboks 32, 110 Tórshavn, í seinasta lagi 13. august 2001.

SNARSKIVAN

## Summarfrí

Vit hava stongt vegna summarfrí frá mánadegi 23/7-01. Byrjað aftur mánadagin 6/8-01.

**Tannlæknastovan í Brekkugøtu**

## Summarfrí

Stongt er til 20.08.01.

**Kliniskur tannteknikari**
**BERGUR**
**Á REYNATRØÐ**
Børkuvegur, 620 Runavík, Tlf. 448480

Uppsetan og skipan av barrum

Til:
Brúdleyp
Rundar føðingardagar
Starvsfólkaveitslur
Ársveitslur
Reseptiónir
og tilíkt



Hans á Lag Sp/f
Tlf. 21 93 83
hanslag@post.olivant.fo

Sosialurin 311820

Sosialurin
www.sosialurin.fo

## Skrivari til Amnesty

Søkt verður eftir fólki til skrivstovuna hjá Amnnesty International Føroya Deild. Arbeiðstíðin er 12 tímar um vikuna, í løtuni mána-, miku- og fríggjadag seinnapart.

Skrivarin hjá felagnum samskipar arbeiðið hjá Amnesty International Føroya Deild. Uppgávurnar eru millum annað:
- at hava opið á skrivstovuni
- at ganga nevndini til handa við tilfari, skipa fundir v.m.
- at skipa samskiftið millum nevndina og bólkarnar
- at samskifta við limirnar
- at samskifta við høvuðsskrivstovuna í London
- at samskipa umseting og tíðindatilfar, sum verður sent fjølmiðlunum
- at samskipa tiltøk, til tess at upplýsa um Amnesty og savna pening til arbeiði felagsins

Vit bjóða eitt starv, sum:
- gevur møguleika at arbeiða við mannarættindum
- er sjálvstøðugt og avbjóðandi við nógvum samskifti úteftir
- gevur møguleika at vinna altjóða royndir

Vit vænta, at komandi skrivarin:
- hevur hug at arbeiða við mannarættindaspurningum (royndir eru til fyrimuns)
- er ágrýtin og nærlagdur
- dugir væl at samskifta munnliga og skrivliga
- hevur gott lyndi
- hevur góðan kunnleika til enskt og til teldunýtslu

Øll eru vælkomin at søkja starvið.

Løn og setanartreytir annars er sambært avtalu við nevndina. Neyvari lýsing av starvinum fæst við at venda sær til Anniku Sølvará, forkvinnu, tlf. 320636, Erling Isholm, skrivara, tlf. 224522, ella við at skriva til amnesty@amnesty.fo

Freistin at søkja er 26. juli 2001. Starvið kann verða sett frá 1. august ella skjótast gjørligt. Umsóknir við skjølum og møguligum viðmælum skulu sendast til:

**Amnesty International Føroya Deild**
Tinghúsvegur 18, 4
Postrúm 1075
110 Tórshavn

*Amnest International er rørsla fyri mannarættindi og frígering úr politiskum fangaskapi.*
*Amnesty International hevur ráðgevandi støðu innan ST og Europaráðið.*
*Føroya Deild hevur virkað síðani 1965. 700 limir eru í Føroya Deild.*

## Summarfrí

Skrivstovan verður stongd vegna summarfrí í tíðini frá mánadegnum 30. juli til mánadagin tann 20. august 2001.

**Sørvágs Kommuna**

## Bilur við skaða til sølu

**Merki:** VW Passat Variant ST CL TD
**Árg.:** 1994
**KM.:** 179.000

Bilurin verður seldur sum hann stendur nú til hægst bjóðandi.

TRYGGINGARFELAGIÐ FØROYAR

Magni Petersen, sýnsmaður
tlf. 345728 · fartlf. 215728
fax nr. 345607
e-mail: mpe@trygging.fo
Beinl. tlf. 345729
at hitta millum–hósdag millum kl. $08^{00}$–$10^{00}$ og fríggjadag frá $08^{00}$–$16^{00}$

Sosialurin
www.sosialurin.fo

## Rentubroyting

Sum avleiðing av seinastu rentubroytingini hjá danska Tjóðbankanum broytir Føroya Banki við gildi frá **21. Juli 2001** rentustigini á inn- og útláni.

**Innlán**
Rentustigini á innláni lækka við 1/4 pst. Høvuðsrentustigini verða sum niðanfyri vist.

| *Saldo, 1.000 kr.* | *3 mdr.* | *12 mdr.* |
|---|---|---|
| 0 - 100 | 3,50% | 4,00% |
| 100 - 300 | 4,00% | 4,50% |
| 300 - 1.000 | 4,50% | 4,75% |
| 1.000 - | 4,75% | 5,00% |

| | |
|---|---|
| Nósakonto | 5,00% |
| Nýtslu-Konto*IN* | 3,50% |
| Uppsparingar-Konto*IN* | 5,00% |
| Bústaðarkonto (+3% í stuðli) | 4,00% |
| 60-ára konto / Ratukonto | 5,50% |

**Útlán og kreditti**
Rentustigini á flestu útlánum - privatum sum vinnuligum - lækka við 1/4 - 1/2 pst. Rentan á flestu 1. veðrættarlánum til bústað lækkar við 1/2 pst.

Fyri bústaðarlán verður rentan henda:

| | |
|---|---|
| 1. veðrættur | 6,00-6,75% |
| Onnur bústaðarlán | 8,75-9,75% |

Rentan á billánum verður 7,00-8,50% alt eftir útgjaldi.

Nærri upplýsingar um nýggju rentustigini fáast frá lundarráðgevum bankans.

FØROYA BANKI